## Trúboðarar latnir leysir

Átta amerikanskir trúboðarar, sum vórðu tiknir og skuldsettir fyri at hava roynt at smugla børn úr Haiti, eru latnir leysir og komu í morgun til USA við einum flutningsflogfari hjá amerikanska herinum. Tey átta vórðu tikin saman við tveimum øðrum amerikanarum, tá tey vóru á veg um markið millum Haiti og Dominikanska Lýðveldið við 33 børnum. Trúboðararnir greiddu frá, at teir høvdu fingið loyvi frá foreldtunum at taka børnini við sær, og ta frágreiðingina góðtók ein dómari í gjár. Leiðarin hjá trúboðarunum og ein sjúkrasystir, sum var saman við teimu, sita framvegis í varðhaldi í Haiti.





*Tey sum roykja og drekka skulu betala ein stóran part av viðgerðini av krabbameini. Fleiri tingmenn halda, at alt tollfrítt keyp av rúsdrekka og sigarettum skal forbjóðast og onkur tingmaður heldur enntá, at rætturin hjá sjómonnum at fáa sigarettir og rúsdrekka í bonn, skal avtakast*

# Dýrari sprutt og sigarettir skulu fíggja viðgerðina av krabbameini

**Fleiri politikarar halda, at prísirnir á sigarettum og rúsdrekka skulu upp fyri at fíggja viðgerðina av krabbameini í Føroyum og onkur løgtingsmaður heldur enntá, at sjómenn skulu missa rættin at fáa sigarettir og rúsdrekka í bonn**

KRABBAMEINSÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Prísurin fyri at seta eina krabbameinsætlan í verk fyri Føroyar, skal ikki klípast burtur av játtanini til annað virksemi í heilsuverkinum.

Tað staðfesti Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður.

Løgtingið hevði aðalorðaskifti í gjár um ætlanina at seta eina krabbameinsætlan í verk fyri Føroyar.

Talan er um eina ætlan í næstan 60 punktum, sum ein arbeiðsbólkur hevur stungið út í kortið og sum skal setast í verk hesi næstu trý árini.

Endamálið er at styrkja munandi um viðgerðina av krabbameini og tá ið øll ætlanin er sett í verk, fer hon at kosta heilsuverkinum 20 milliónir í rakstri um ári.

Harumframt skulu íløgur uppá 27 milliónir gerast í heilsuverkinum hesi næstu trý árini, men ein partur av íløgunum eru longu játtaðar í ár.

Tað er greitt, at Løgtingið tekur væl undir við krabbameinsætlanini.

Men samstundis varð spurningurin reistur um, hvussu ætlanin skal fíggjast og tað vóru fleiri tingfólk, sum fregnaðist um fíggingina.

Og her vóru tað fleiri tinglimir sum staðfesta, at fíggingin skal finnast við at hækka avgjøldini á sigarettum og rúsdrekka.

### Øktir heilsuskattir

Ein av teimum var Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður og sum eisini var landsstýrismaður, tá ið krabbameinsætlanin varð sett á skinnarar.

Hann gjørdi púra greitt, at ongin krabbameinsætlan skal setast í verk, har fíggingin skal finnast við at skerja annað virksemið hjá heilsuverkinum.

- Tí er bara ein máti at fíggja krabbameinsætlanina upp á og tað er við heilsuskattum, sum síðani skulu markast beinleiðis til krabbameinsætlanina.

Hann helt eisini, at tað einasta rætta er at krabbameinsætlanin fær sína serstøku játtan á fíggjarlógini, so at ongin ivi skal vera um, hvat peningurin skal brúkast til. Hetta forðar eisini fyri, at hann fer í stóra pott og kann verða brúktur til onnur endamál.

Tað var ongin ivi í Løgtinginum um, at tá ið tosað var um heilsuskattir, varð mest hugsað um at hækka avgjøldini á rúsdrekka og sigarettum.

Fleiri tinglimir vístu á, hvussu ómetaliga vandamikil, serstakliga roykingin er og bæði Karsten Hansen og aðrir tinglimir átalaðu, at Atlantsflog framhaldandi sleppur at skeinkja ókeypis rúsdrekka.

Teir mæltu eisini til, at avtaka alt, sum eitur tollfrí søla av rúsdrekka og sigarettum.

Sjálvur vísti Hans Pauli Strøm á, at øll krabbameinsætlanin kann fíggjast við at avtaka tollfríu søluna av sigarettum og rúsdrekka.

### Sjómenn missa bonn

Kári á Rógvi, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin var ein av teimum, sum tekur undir við at avtaka tollfría søluna á sigarettum og rúsdrekka.

Men hann helt somuleiðis, at rætturin hjá sjómonnum at keypa sigarettir og rúsdrekka í bonn, skal avtakast, eins og øll onnur tollfrí søla.

- Lat okkum taka tað tungu avgerðina og avtaka tollfríu søluna, helt hann.

Aksel V. Johannesen segði, at kanska kunnu avgjøldini hækkast eitt sindur meir, men hann mælti til størsta varsemi.

- Tað er ein spurningur, hvussu nógv prísirnir kunnu hækka afturat, áðrenn tað fer at eggja til smugling í stórum stíli og til at fólk fara at bryggja sjálvi heima í kjallaranum.

Avgjøldini eru rættiliga høg frammanundan og tað er ein spurningur, hvussu nógv, tey kunnu hækkast afturat, heldur hann.

Hendir tað, at smugling og heimabrygging fer at vinda upp á seg, er skjótt at missa tamarhaldið á støðuni, so at vit missa yvirlitið yvir, hvussu nógv í veruleikanum verður roykt og drukkið í Føroyum, heldur landsstýrismaðurin í heilsumálum.

Kortini nevndi landsstýrismaðurin eisini møguleikan fyri at forbjóða allari tollfríari sølu.

### Ivasamur

Hinvegin hildu Tórbjørn Jacobsen og aðrir løgtingslimir at tað er er ein spurningur, hvussu nógv prísskrúvan kann spennast afturat.

Hann heldur, at tað er tórført at venja gamlar hundar, so tað fer ikki at gera mun at hækka prísin enn meiri.

Kortini helt partakvinna hansara, Bergtóra Jacobsen, at hægri prísir kunnu forða fyri, at fleiri aldrin festa í sína fyrstu sigarett og fara at roykja.

Lesi eisini aðrar greinar um sama mál tí aðrastaðni í blaðnum hava vit samrøðu við lansstýrismannin og eina uppgerð yvir, hvussu inntøkurnar hjá landskassanum eru av heilsuskattum, sum avgjøldini á sigarettum og søtmeti so flott eita á nýføroyskum politikaramáli.